# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Leif Petersen, Sandavágur:

# 40 ára starvsdag hjá Postverkinum



*Leif Petersen, fyrrverandi posthúsleiðari í Sandavági, og Sofus Clementsen, postverksstjóri*

**Mánadagin 15. januar 2006 var móttøka á posthúsinum í Sandavági í sambandi við at Leif Petersen, posthúsleiðari, hevði 40 ára starvsdag og er givin vegna aldur í hesum starvi**

MÓTTØKA
*Myndir: Ruth Myllhamar*

Møtt vóru familja og starvsfelagar - eisini fyrrverandi starvsfelagar. Postverksstjórin Sofus Clementsen vitjaði eisini í hesum sambandi.

Leif er úr Sandavági. Hann gekk á preliminerskúla og sigldi í nøkur ár, áðrenn hann í 1964, tók við sum posthúsleiðari í Sandavági.

Posthúsið var tá í húsunum hjá abbanum, Dánjal Peturi Nielsen, "úti í Bakka".

Leif tók við eftir mostur sína Sofíu Nielsen, sum tá legði frá sær sum posthúsleiðari. So postur hevur verið í familjuni í trý ættarlið.

Í 1974 flutti posthúsið í húsini hjá Leif "uppi á Steig", og var har til postverkið keypti bygningin, har Sjóvinnubankin í Sandavági helt til, áðrenn bankarnir løgdu saman. Hetta var í 1997.

Í sínum dagliga arbeiði hevur Leif havt samskifti við nógv fólk í bygdini, við tað at hann hevur sitið við avgreiðsluna á posthúsinum.

Í sambandi við arbeiði á posthúsinum sigur Leif, at fyrr var meira pakkapostur, enn tað er í dag. Hetta komst serliga av, at fólk "bestiltu" nógv úr donskum príslistunum.

Meðan hann hevur arbeitt á posthúsinum, hevur hann havt farloyvi. Tá hevur hann verið til skips og róð út. Nú, Leif er farin frá, fær hann betur tíð til síni áhugamál sum t.d. at rógva út, ganga á fjall og passa heimaseyðin.

Í 1965 giftist Leif við Estrid, f. Hansen, av Argjum. Tey eiga trý børn: Estrid Súna (Hansen), sum býr í Sandavági, og Hans Paula og Janitu, sum bæði búgva í Hoyvík. Abbabørnini eru 8 í tali.

Posthusið í Sandavági lat upp "úti í Bakka" tann 1. oktober 1918. Tey sum høvdu ábyrgdina av posthúsinum vóru Anna Sofia og Dánial Petur Nielsen. Í 1948 tók dótturin Sofía Nielsen yvir, og hevði hon postin til 1964, tá Leif tók við sum posthúsleiðari.

Í dag starvast trý fólk á posthúsinum í Sandavági, og leiðari er Angelie Mouritsen.

hjá Jákupi Klaksvík

Nú 40 ár eru liðin, síðan vit byrjaðu at gera mat, vilja vit bjóða til

**móttøku**

*í Skálanum*

fríggjadagin 19. januar 2007

kl. 16.00 til 18.00

har øll eru vælkomin !

***Hergerð & Jákup Ziskason***



*Posthúsið í Sandavági*



*Leif saman við starvsfelagum, f.v.: Hjalma Simonsen, fyrrverandi postboð, Leif Petersen, Ruth Myllhamar, postboð, Oddvør Thomasen, fyrrverandi postboð, Olga Joensen, postboð, og Angeilie Mouritsen, nýggjur posthúsleiðari*